# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 1. august kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagur 3. august kl. 17 Møti. Tala: Jógvan Højgaard. Innsamling til húsið.
Aftaná møti verður drekka.
Mikudagur 6. august kl. 6 Bøn, kl. 20 Bíbiltími v/Kára P. Højgaard Áps. 8, 1-4, Stór forfylging.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Thabor í Fuglafirði**
Sunnukvøldið tann 3. august kl. 18 verður møti í Thabor. Øll eru hjartaliga vælkomin!
**Sunnudagin 17. august 2008** verður skipa fyri útferð til Sandoyar. Har verður nógv stuttligt á skránni, bæði fyri børn, ung og vaksin :)
Nærri kunning verður at hoyra á komandi møtum, ið eru hvørt sunnukvøld kl. 18! Tekning fer fram eftir møti og eisini við at senda eitt sms boð til nr. 595566 við navni og aldur. ØLL eru meira enn hjartaliga vælkomin við :)

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 verður møti við Petur Súna Jacobsen - Evni: Faðir várr. Morid og Jórun luttaka við sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K Klaksvík**
Sunnudagin 3. aug. kl.17.30 Bønarløta,
kl. 18 Sang- og vitnimøti.
Innsavnan til húsið,
kl. 21.00 Ungdómsmøti við Jóhannes Miðskarð.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti v/ Karstin Justesen og Ingibjørn Royðutoft. Mirjam Debora syngur.
Leygardagin kl. 10 er morgunbøn, vitjan av bønarkvinnu úr YWAM.
Sunnudagin kl. 11 er møti. Ólavur Jacobsen og Kári Brynjar tala.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 bøn- & lovsangur. Kl. 18 møti. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Hjørleif og Petru Poulsen, Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Vágur**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 18 Evang møti. Øll eru vælkomin.

**Sion, Vágur**
Bønarmøti mánakvøld kl. 20.00.
Sunnudag kl. 11 og kl. 18 Møti.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur Skarvanes - Dalur verður sunnudagin 3. august. Farið verður av Gomlurætt kl. 11.15. Túrurin er miðal.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491 Fax 316481*
*Teldupostur:tilhald@torshavn.fo*
Tilhaldið verður stongt frá 1. juli og til og við 15. august

**Kunningastovan, Felagið Tórshavn**
Avgreiðslutíðir í summar frá 16. juni til 1. september:
Mánadag til fríggjadag er opið 8:00-17:30.
Mikudag er opið 8:00-20:30
Leygardag er opið 9:00-14:00

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur summarsteðg. Byrjað verður aftur 1. september.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit hava summarsteðg.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Vit eru farin í summarfrí. Byrja verður aftur mánadagin 18. august.

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Dagtilhaldið Vesturskin Toftir**
er í summarfrí frá 18.06.2008. Opið verður aftur 02.09.2008.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur:
heilaf@post.olivant.fo

**Sandoyar Kunningarstova**
Mørkin Mikla 3kj
FO - 210 Sandur
Tel. 361836, fax 361256
www.visitsandoy.fo
sandinfo@post.olivant.fo
Opið er:
summar: 1. apríl – 31. aug. kl. 9-12 & 13-16.
Vetur: 1. sept. – 31. mars kl. 13-16.

**Listasavnið á Sandi nú opið gerandisdagar**
Við tað at summarið er í nánd, so er Listasavnið nú opið aftur týsdag - sunnudag kl. 14-16. Tó er tað stongt mánadag. Listasavnið á Sandi er sanniliga vert eina vitjan.

**Tinghúsið á Hjalla**
***Vit lata aftur frá 9. juli til 18. august.***
Tinghúsið á Hjalla er ein endurnýtsluhandil, ið selur møblar og lutir, ið verða latnir inn á Brennistøðina á Sandvíkarhjalla. Vit taka tó ikki móti klæðum, hvítvørum, billutum og bókum. Alv rekur handilin. Vanliga er opið mánadag kl. 13-17 og týsdag kl. 13-16.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

## Brúðarmyndir



*Hjartalliga takka vit tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu brúnabandsdag okkara 17. mai 2008 ógloymandi.*
***Vinarliga Alvilda og Jógvan***



Fríggjadagin 8.8.08 giftast Arnleyg í Lon Miðvágur og Rógvi Mohr Fuglafjørður. Vígslan verður í Siloa í Fuglafirði kl 15. Um veðrið er tilvildar, verður vígslan úti, í Bugnum í Fuglafirði. Drekkamuður verður aftaná vígsluna í Siloa og øll eru vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Siloa kl 19.



Fríggjadagin 8. august giftast Rakul Petersen úr Hvalba, og Jóan Petur á Stongunum úr Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 15.00. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.



Fríggjadagin 8/8-08 kl. 13 giftast Anita Arge, Argir og Jens Kartin Rasmussen, Fuglafirði. Vígslan verður í Nebo á Toftum. Øll er hjartaliga vælkomin til ein drekkamunn í missiónshúsinum í Æðuvík frá kl. 14 - 16.



Sára Ejdesgaard og Rógvi Ellendersen skullu giftast tann 9-8-2008 í Tvøroyar kirkju kl. 16.00. Veitslan verður hildin fyri innbodnum á Seglloftinum kl. 19.00.



Fríggjadagin 8. august kl. 16 giftast i Ólavskirkjuni í Kirkjubø, Tórgunn Kvilt Olsen og Jørgen Meitilberg Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00.



Hósdagin 14. august giftast Gunnleyg Eldevig úr Fuglafirði og Richard Michael Archer ur Dorchester, Bretlandi. Vígslan verður í Stinsford Church kl. 13.30. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 16.00 og opið hús frá kl. 19.00 i Chantmarle Manor, Dorchester. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma kunnu ringja til Duritu á 273185 ella Unn á 224253 innan 4. august.
**Heilsanir kunnu sendast til Gunnleyg & Richie, 16 Benjamin Ferrey House, Somerleigh Road, Dorchester, Dorset, DT1 1TL, England**



Leygardagin 23. aug. kl. 14.00, giftast í Ebenezer í Havn, Jeanette Ottosen, Hoyvík og Solomon Magura, Zimbabwe, Eftir vígsluna verður móttøka í niðara sali, øll eru hjartaliga vælkomin. Veitsla verður fyri innbodnum á Gjáargarði kl. 19.00.



Leygardagin 6. septembur kl. 10 giftast í Glyvra kirkju Anita Knudsen og Bergur Fossdalsá. Morgunmatur verður í B68 húsinum kl. 11. Øll er vælkomin.
**Anita & Bergur**

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 6. august verður Jabjørt Thomsen, Klaksvík 60 ár. Dagurin verður hildin á Soli Deo Gloria frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ár**
Mikudagin 6 august verður Heiðvík Midjord, Tvøroyri 80 ár. Hon verður at hitta á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi millum kl. 14.00 og 16.00.

**85 ár**
Mándagin 11. aug. fyllir Nanny Henriksen, fyrrverandi sjúkrasystir Klaksvík 85 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 9. aug. hjá soninum Traðatún 9, Argir.
Opið hús verður kl. 16, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 8. august kl 17 giftast í Havnar kirkju Elisabeth Restorff Hansen, Tórshavn, og Martin Nipgaard Hansen, Munkebo.

Leygardagin 16. august kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Jóhanna Hansen og Benny Hansen. Veitslan verður hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 447174 ella 253994 innan 1. august.

Leygardagin 16. august giftast Anna Simonsen og Óli Joensen. Vígslan verður Undir Fossum 32 kl.13. Brúdleyp verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

***Vit skulu giftast***
Leygardagin 23. aug. kl. 14.00, giftast í Eiðis kirkju Anna Maria M. Kruse og Janus Knudsen. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl 18.00. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, vera vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 1. aug. við at ringja á tlf: 448070, Anna Maria 748070 ella Janus 588703

Leygardagin 6. septembur kl. 14 giftast í Viðareiðis Kirkju, Mamy Dahl Sørensen, Viðareiði og Hákun Súni Egilsnes, Vestmanna. Brúdleypsveitslan verður hildið í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17. Tey ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá innan 6. august á tlf., 220566, 310318, 424610, 451210 ella mds.hse@gmail.com